

*Allan Skaalum, nýsettur sjúkrahússtjóri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eg gleði meg at koma í gongd

**Í dag, 16. oktober, settist Allan Skaalum í ovasta sessin á Landssjúkrahúsinum. Nýggi sjúkrahússtjórin gleðir seg til avbjóðingarnar og hann væntar at sita øll tey 5 árini, ið áramálssetta starvið inniber.**
**- Tað er við tí í huga, at eg eri settur og tað er við tí í huga, at eg fari í starvið, sigur Allan Skaalum**

SJÚKRAHÚSSTJÓRI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nýggi sjúkrahússtjórin eitur Allan Skaalum og hann settist í stjórasessin í dag.

Nýggi stjórin gleðir seg at koma í gongd og hann er sjálvandi spentur, nú hann tekur við nýggjari avbjóðing, greiðir hann frá, tá vit kvøldið fyri, at hann tekur við, seta honum nakrar spurningar.

Hevur tú fyrireikað teg til nýggja starvið

- Tað er nokk ikki fyrr enn nú, at ein veruliga fær sett seg inn í, hvat starvið inniber, og tað fari eg at gera. Fyrstu dagarnir ganga óivað við tí. Men eg havi hugt eitt sindur í almenn skjøl, so sum roknskaparskjøl og onnur, sigur Allan Skaalum, sum ikki reiðiliga visti hvat hansara fyrsti dagur í starvinum fór at hava við sær, men hann gleðir seg at hitta fólkini og at byrja í starvinum.

Tú hevur fjølbroyttar starvs- og leiðsluroyndir. Koma hesar væl við nú?

- Jú, tað gera tær avgjørt. Tað eru jú eisini nógvir ymiskir starvsbólkar á Landssjúkrahúsinum, men í starvinum sum heild koma fjølbroyttu royndirnar væl við, sigur Allan Skaalum.

Eru viðurskifti á Landssjúkrahúsinum, sum tú kundi hugsað tær at broytt?

- Nógvar broytingar eru í gongd og tað leggur ein eisini til merkis, um ein hugsar um karmarnar. Og hvussu skjótt hetta gongur, veit ein ikki, men peningur verður settur av til slíkt. Men so eru tað eisini aðrar broytingar, ið eru í gongd, sum til dømis arbeiðið við talgildari journalskipan. Men um eg beinleiðis havi aðrar broytingar her og nú veit eg ikki, sigur nýggi sjúkrahússtjórin.

## Nógvir stjórar

Stjórarnir undan tær hava verið nógvir og títtir. Starvið er áramálsset í 5 ár. Hvussu longi væntar tú at sita í stjórasessinum?

- Eg vænti at sita tey fimm árini. Tað er við tí í huga, at eg eri settur og tað er við tí í huga, at eg fari í starvið, sigur Allan Skaalum, og leggur afturat, at tað er rætt, at nakað av útskifting var eitt tíðarskeið, men at hetta nú er nakað síðani.

Hvussu væl kennur tú staðið, har tú nú er stjóri?

- Ikki betur enn fólk flest. Men síðani eg fekk starvið havi eg sjálvandi sett meg inn í ymisk viðurskifti. Men royndir og útbúgvingar verður helst tað, ið eg mest komi at halla meg at, sigur Allan Skaalum.

Nýggi sjúkrahússtjórin hevur ikki eina beinleiðis meting, tá hann verður spurdur um sína meting um, hvørt Føroyar bara eiga at hava eitt, ella tey núverandi 3 sjúkrahúsini.

- Eg eri settur sum sjúkrahússtjóri á Landssjúkrahúsinum og havi sum so ikki eina serstaka meining um hatta, sigur Allan Skaalum og takkar fyri, tá vit ynskja honum alt tað besta í nýggja starvinum.

## FAKTA

Allan Skaalum er 43 ára gamal og útbúgvin cand.merc. innan leiðslu og marknaðarføring frá 1991. Hann hevur starvs- og leiðsluroyndir innan bæði almenna og privata arbeiðsmarknaðin.

Allan Skaalum hevur verið vinnukundaráðgevi í Føroya Banka síðani 2001. Áðrenn hetta hevur hann verið stjóri á ALS í 2 ár og stjóri í miðlafyritøkuni ReproZ í umleið 2 ár. Hann hevur eisini arbeitt sum búskaparfrøðingur í Oljufyrisitingini. Harumframt hevur hann royndir frá nevndararbeiði og sum semingsmaður.

Starvið sum sjúkrahússtjóri er áramálssett í 5 ár.



*Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri, Tummas í Garði, læknastjóri og Marin Vagn,*
*sjúkrarøktarstjóri*

## Falsan av heilsuváttanum

Í sambandi við herda eftirlitið við heilsuváttanum frá russiskum myndugleikum, hava norðmenn gjørt nýggja mannagongd fyri útflýggjan av heilsuváttanum í fiskivinnuni.

Sambært Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, hava vit í Føroyum latið nógvar upplýsingar til veterineru myndugleikarnar í Russlandi í seinastuni. Í kjalarvørrinum av hesum, fara vit helst at leggja okkara siðvenju tætt uppat tí, sum norðmenn gera, fyri at tryggja okkum ímóti falsan av heilsuváttanum, og harvið tryggja at útflutningurin gongur so lagaliga, sum til ber.

Fyrstu stigini í hesum eru longu tikin. Framleiðarar og útflytarar fáa í næstum vegleiðing um, hvussu nýggja mannagongdin fyri undirskriving av heilsuváttanum verður, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan í kunngerð.

--

## Ridluskriði staðfestur í Danmark

Í sambandi við, at royndir vórðu tiknar av einum sjálvdeyðum seyði í Kjellerup við Viborg, er Scrapie - ella Ridluskriði - nú fyri fyrstu ferð staðfest í Danmark.

Seyðurin kom úr einum flokki uppá 17 seyðir. Á kanningarstovum bæði í Danmark og í Onglandi varð óvanliga slagið av ridluskriða staðfest. Av Heilsufrøðiligu Starvstovuni verður sagt, at talan er ikki um eitt álvarsamt ella serliga smittandi slag av sjúkuni.